# Eiðis kommuna • FO- 470 Eiði • Faroe Islands

•Tlf. (+298) 200400 • Fax. (+298) 423477 ,• T-post: eidi@eidi.fo, •Heimasíða: www.eidi.fo,


Eiði, tann 08. apríl 2020

**V.v. vatnveitingini í Svínáum**

Sum áður fráboðað, hevur Eiðis kommuna arbeitt við at finna út av, hví vatnveitingin í Svínáum er svikalig.

Fundur var í dag. Borgarstjórin, tekniska nevnd og arbeiðsformaðurin vóru á ástaðarfundi og ætlan var løgd fyri, hvussu hesin trupulleiki skal loysast.

Avtalað var, at seta eina alarmskipan upp, sum sendir telefonboð til arbeiðsformannin tá ov lítið av vatni er í vatnbrunnunum. Kommunan hevur sett seg í samband við veitara og veitari kemur við tilboðið og tíðarætlan eftir páskahøgtíðina.

Keðiligi brúni liturin sum hevur verið í vatninum, kemur í høvuðsheitum av, at brunnarnir tømast og tað kemur ov nógvur røringur í vatnið í brunnunum. Við omanfyrinevndu alarmskipan skuldi hesin trupulleikin ikki komið fyri.

Somuleiðis varð avtalað, at knýta ein eldri brunn saman við nýggjaru brunnunum. Hesin brunnur liggur ikki langt frá nýggjaru brunnunum og vatnið ið rennur í hendan brunnin, kemur ikki úr inntakinum hjá SEV. Hetta verður gjørt, fyri at økja um vatnmongdina sum rennur í brunnarnar.

Í løtuni eru tríggir vatnbrunnar knýttir til Svínáar bygd, hetta skuldi undir øllum vanligum umstøðum verið ríkiliga nógv. Brunnarnir hava tó, alt ov ofta, verðið tómir, og hevur hetta givið skitið vatn.

Vit eru sera hørm um, at vit hava havt hesar trupulleikar við vatnveitingini og hetta málið skal loysast umgangandi.

Eru spurningar ella ivamál, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við borgarstjóran, á tel 740400 ella á t-post eidi@eidi.fo

Vinarliga

EIÐIS KOMMUNA

*Jógvan í Skorini, borgarstjóri*